# Lensar kjølvatnið – men ikki pengapungin



**LENSING** »Kann mann ikki gera lensingina umborð bæði bíligari og snildari – uttan at tað gongur út yvir góðskuna?«. Hesin spurningur var tikin fram millum nakar menn í Kollafirði ein dagin fyri nøkrum árum síðani. Har varð tosað og har varð handlað. Og úrslitið gjørdist ein forvitnislig uppfinning, sum síðani er bæði roynd umborð á skipi og víst fram fyri almenninginum. – Teir sum hava roynt tað, lata sera væl at okkara uppfinning, sigur ein av monnunum aftanfyri Green IQ í Kollafirði, Jóhann Fagraklett.

Orð/mynd: Snorri Brend

Tað finnast longu fleiri ymiskar skipanir umborð á skipum til lensing. Í hesum førinum er heldur talan um eina uppfinning, ið er eitt ískoyti til aðrar.

**» Teir sum hava roynt tað, lata sera væl at okkara uppfinning**

Hóast fyritøkan ynskir bæði at vera grøn og intelligent, so er henda uppfinningin ikki á tremur við alskyns sløgum av elektronikki.

– Tað er kanska júst hetta, sum ger at úrslitini hava verið so mikið góð, at vit nú fara at halda fram at menna hesa skipanina, sigur Jóhann Fagraklett.

Green IQ var við á North Atlantic Fisk Fair í farnu viku. Endamál teirra var í størri mun at vísa skipanina fram og vita um áhugi er fyri henni, heldur enn at selja hana.

Teir fingu millum annað vitjan av løgmanni, Kaj Leo Johannesen og her fekk hann at vita, at henda skipanin longu er roynd umborð á tveimum føroyskum skipum – Arctic Viking og Saksaberg.

Lítil ivi er um, at nýggja fyritøkan í Kollafirði hevur rakt ein tørv hjá nógvum skipum. Spennandi verður, hvussu tað fer at gangast fyritøkuni í framtíðini.

### Einki viðlíkahald

Green IQ var ein av teimum sløkum 100 fyritøkunum á Fish Fair í farnu viku.

Jóhann Fagraklett og hinir í felagnum eru fult greiðir um tørvin á einum einføldum og vælvirkandi lensara umborð – og sum ikki minst virkar, tá hon skal.

Nógv skip spyrja eftir eini loysn við lensingini, sum í fyrsta umfari er viðlíkahaldsfrí. Og í øðrum lagi ynskja teir eisini at sleppa undan at gjalda fyri filtur og líknandi lutir.

– Og so minkar loysnin eisini um brunavandan umborð, vísir Jóhann Fagraklett á.

### Hækkar trygdina

Menninir handan Green IQ eru vitandi um, at aðrir lensarar av olju hava ein ávísan trupulleika: Teir fáa ikki fáa fatur á teirri oljuni, sum flýtur omaná kjølvatninum.

Hetta ger so aftur sítt til øktan vanda fyri eldsbruna ella havdálking, tá kjølvatn verður lensað.

Ein annar veruleiki er, at í nógvum førum verður sápa brúkt fyri at fáa oljuna at blanda seg upp í kjølvatnið undir lensing. Úrslitið av hesum er, at oljuútskiljingin ikki virkar til fulnar.

– Vit hugsaðu leingi um, hvussu vit kundu koma hesum trupulleikanum til lívs. Og so komu vit so við og við framá henda lensaran, sum eftir okkara meting er bæði ómakaleys og ikki minst ein bílig loysn fyri tann føroyska flotan og tann sum siglir á heimshøvunum, sigur Johann Fagraklett.

Ein onnur positiv fylgja av hesum er, at ein samstundis hækkar trygdina umborð á skipunum og at ein ikki allatíðina skal hugsa um viðlíkahaldið.

– Vit síggja í øllum førum ljós uppá framtíðina, sigur Jóhann Fagraklett.

*snorri@sosialurin.fo*

### STÓRUR ÁHUGI

*Bæði úr Føroyum, Noregi, Grønlandi, Danmark og Canada sýndu oljulensaranum stóran áhuga. Teir vístu eisini stóran áhuga fyri separator-tanganum og pumpuni. - Vit hava nú avgjørt at leggja okkum eftir at gera og selja eina mobila eind, sum verður á somu støðd sum hesin á framsýningini, sigur Jóhann Fagraklett (vinstrumegin). Tann fyrsta serian kann verða klár seinni í summar*